Viðmerkingar frá KLF

§ 6. Fosturtøka kann bara verða framd av lækna í sjúkrahúsverkinum.Stk. 2. Stríðir tað ímóti etisku ella átrúnaðarligu fatanini hjá einum løggildum heilsustarvsfólki, ið starvast á sjúkrahúsi, at fremja ella viðvirka til fosturtøku, skal viðkomandi eftir áheitan sleppa undan hesum, og sjúklingurin skal verða vístur til annað løggilt heilsustarvsfólk. Hetta er eisini galdandi fyri tey, sum eru undir útbúgving til nevndu størv

Viðmerking: Abort kann gerast av privatpraktiserandi gynekologi.
Mælt verður harafturat til at Stk. 2 verður galdandi fyri øll heilsustarvsfólk, eisini í primæra sektorinum.

Tað er ósamsvar millum "Uppskot til Løgtingslóg umfosturtøku (Fosturtøkulógin)" og "Bekendtgørelse af Sundhedsloven" sum er sett í gildi í Føroyum í form av "Anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021"

Sambart "Uppskot til Løgtingslóg umfosturtøku (Fosturtøkulógin)":
"Kvinna undir 18 ár § 9. Er kvinnan undir 18 ár, og er hon ikki gift, skal tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, geva samtykki til at søkja um fosturtøku.Stk. 2.Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann samráðið loyva, at samtykki sambært stk. 1 ikki skal innheintast. Stk. 3.Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann samráðið geva loyvi til fosturtøku, sjálvt um samtykki sambært stk. 1 verður noktað"

Sambart "Anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021":

§ 17. En patient, der er fyldt 15 år, kan selv give informeret samtykke til behandling. Forældremyndighedens indehaver skal tillige have information, jf. § 16, og inddrages i den mindreåriges stillingtagen.

Stk. 2. Såfremt sundhedspersonen efter en individuel vurdering skønner, at patienten, der er fyldt 15 år, ikke selv er i stand til at forstå konsekvenserne af sin stillingtagen, kan forældremyndighedens indehaver give informeret samtykke.

LM-014/2025

I DK
Bekendtgørelse af sundhedsloven
Mindreårige

§ 17. En patient, der er fyldt 15 år, kan selv give informeret samtykke til behandling. Forældremyndighedens indehaver skal tillige have information, jf. § 16, og inddrages i den mindreåriges stillingtagen.

Stk. 2. Såfremt sundhedspersonen efter en individuel vurdering skønner, at patienten, der er fyldt 15 år, ikke selv er i stand til at forstå konsekvenserne af sin stillingtagen, kan forældremyndighedens indehaver give informeret samtykke.

Mælt verður til at broyta § 9 stk1 til 15 ár so tað samsvarar við Sundhedsloven "§ 17. En patient, der er fyldt 15 år, kan selv give informeret samtykke til behandling. Forældremyndighedens indehaver skal tillige have information, jf. § 16, og inddrages i den mindreåriges stillingtagen."

Mælt verður til at strika §9 stk2 og stk3. Harafturat verður mælt til at kvinnan og heilsustarvsfólk í serligum førum kann frávelja kunning til foreldramynduleikan. Hetta í serligum førum har tað eftir individuella meting verður mett skaðiligt fyri kvinnuna at foreldramynduleikin fær kunning.

Vinarliga heilsan

Vegna Kommunulæknafelagið
Rói á Kósini, kommunulækni